KÍ-VB:

# Tunt í VB-verjuni



**Vágbingarnir eru skerdir í verjupartinum, nú teir leygardagin fara til Klaksvíkar**

UPPTAKT
*Jákup Mørk*

Eftir at tað stóran part av árinum hevur sæð heldur dapurt út hjá besta fótbóltsliðnum í Klaksvík, tykjast leikararnir og ikki minst áskoðararnir nú brádliga at hóma møguleikan fyri bronsumerkjum. Sum kappingin hevur háttað seg, er tað nevnliga soleiðis, at flestu liðini hava verið sera óstøðug, og tí hevur KÍ bert trý stig upp til bronsuna, eftir at teir undanfarna vikuskifti bastu HB í Gundadali.

Hetta hevur ivaleyst eisini hava alstóran sálarligan týdning á leikararnar, og sjálvsálitið er tí ivaleyst í toppi, tá teir leygardagin taka ímóti vágbingum.

Í Klaksvík hava teir eisini so at siga alt fólkið tókt til dystin. So at siga, tí tveir av teimum leikarum, sum í ár hava biðlað til pláss á fremsta liðnum, eru ikki longur í Føroyum. Símun Joensen er farin til USA í eitt ár, meðan Niclas Niclasen er farin til Danmarkar í lestrarørindum.

Hinvegin er Kurt Mørkøre aftur í landinum, eftir at hann hevur verið í Noreg hesa vikuna, meðan roknað verður við, at bæði Harley Bertholdsen og Jan Andreasen kunnu roknast at vera á liðnum aftur.

Alt í alt tykjast teir í KÍ at vera so væl fyri, sum til ber, og einki er at ivast í, at teir fara at gera sítt til, at møguleikin fyri bronsumerkjum eisini skal vera til staðar, tá vágbingar fara suðuraftur.

## Eingir tvíburðar

Í Vági tykist støðan við fólkinum ikki at vera eins góð, sum hon er í Klaksvík.

Tað man í øllum førum førum vera langt síðani, at VB hevur spælt, uttan at nakar av Jacobsen-tvíburðunum eru á liðnum, men hetta verður væntandi støðan leygardagin.

Báðir vórðu teir skaddir í dystinum móti B68, og tá Tórður Holm eisini hevur fingið ein skaða at dragast við, sær av álvara svart út hjá vágbingunum.

Hinvegin telir tó eisini, at tað loksins sær út til, at venjarin, Krzystof Popczynski, nú aftur verður leikandi venjari frá fyrsta bríksli, og ikki sum seinast sum skiftisleikari.

Tungt verður tað tó undir øllum umstøðum hjá vágbingunum, men teir hava fyrr víst seg at vera stinnir, tá nógv stendur á, so einki er avgjørt undan dystinum.

B68-NSÍ:

# Týðandi lokaluppgerð

**Umframt týdningin av at vera fremstir á Skálafjørðinum stríðast B68 og NSÍ eisini um bronsuna undan dystinum leygardagin**

UPPTAKT
*Jákup Mørk*

Spenningurin er stórur á Skálafirðinum undan dystinum millum B68 og NSÍ. Bæði liðini høvdu ætla sær at gjørt seg galdandi í oddinum hetta kappingaárið, men hóast hendan vónin helst er farin, so eru tey bæði partar av sera javna stríðnum um bronsumerkini.

## Skerdir grannar

Tí er tað ógvuliga umráðandi, at stig verða vunnin leygardagin, og týdningurin gerst neyvan minni, nú talan er um lokaluppgerð. Eina lokaluppgerð, sum hvørgin parturin vil tapa.

Bæði liðini eru tó nakað skerd til dystin, og fyri bæði er galdandi, at talan er um týdningarmiklar spælarar, sum eru burturfrá.

Hjá toftamonnum var missurin av Øssi Hansen í summarsteðginum uttan iva svárur, men har umframt mugu teir vera bæði Jan Dam og Fróða Benjaminsen fyri uttan til komandi dystin, so spurningurin er helst, hvussu toftamenn standa seg uttan hesar tríggjar.

Harafturat tykist tað í løtuni vera ivasamt, um Arnold Joensen verður við um vikuskiftið. Tað ljóðaði fyri stuttum, at hann var ávegis til KÍ, men fyri Sosialinum avsannar Arnold hesi tíðindi sum slatur. Hvussu er og ikki, so var hann ikki við, tá B68 vitjaði í Vági.

Heldur ikki Runavíkingar hava allar sínar mans tøkar. Djóni N. Joensen er staddur uttanlands í arbeiðsørindum, og tað er í øllum førum ein leikari, sum hevur stóran týdning fyri runavíkingar.

Sostatt er líkt til, at báðir partar mugu vera nøkur av sterkastu vápnunum fyri uttan, men hinvegin er einki at ivast í, at teir 22, sum fara á vøllin, fara at geva alt tað, sum teir eiga í sær, og tað nýtist so avgjørt ikki at vera so lítið.

# Soleiðis hevur gingist

Niðanfyri sæst, hvussu leikur er farin fram, tá mótstøðuliðinni leygardagin hava hitst seinastu tíggju árini. Viðmerkjast skal, at dysturin millum GÍ og HB ikki verður leiktur hetta vikuskiftið, men ístaðin er fluttur til 12. september.

| | '00 | '99 | '98 | '97 | '96 | '95 | '94 | '93 | '92 | '91 | Í alt | |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| GÍ-HB | 1-2 | 1-2 | 1-3 | 1-1 | 5-1 | 2-1 | 4-1 | 0-0 | 1-2 | 4-3 | 4-2-4 | 20-16 |
| KÍ-VB | 2-2 | 2-1 | 2-1 | 3-2 | 2-2 | 1-2 | - | 1-0 | 3-3 | 1-0 | 5-3-1 | 17-13 |
| B68-NSÍ | 2-0 | 0-0 | 3-2 | 0-2 | - | 4-1 | 3-2 | - | 4-2 | 1-1 | 5-2-1 | 17-10 |
| FSV-B71 | 2-1 | - | - | 0-0 | 1-1 | 1-1 | - | - | 2-1 | - | 2-3-0 | 6-4 |
| B36-EB/S | - | - | - | - | - | - | 3-1 | - | - | - | 1-0-0 | 3-1 |

www.sosialurin.fo
www.sosialurin.fo

## Støðan, 1. deild menn

| | | dystir | v - j - t | vunnin mál | tapt mál | mál-munur | stig |
|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 1 | GÍ | 11 | 10 - 1 - 0 | 37 | 10 | 27 | 31 |
| 2 | B36 | 11 | 9 - 1 - 1 | 40 | 9 | 31 | 28 |
| 3 | B68 | 11 | 5 - 2 - 4 | 22 | 18 | 4 | 17 |
| 4 | VB | 11 | 5 - 1 - 5 | 27 | 15 | 12 | 16 |
| 5 | HB | 11 | 5 - 1 - 5 | 21 | 14 | 7 | 16 |
| 6 | KÍ | 11 | 5 - 0 - 6 | 12 | 26 | -14 | 15 |
| 7 | NSÍ | 11 | 4 - 2 - 5 | 12 | 14 | -2 | 14 |
| 8 | EB/Streymur | 11 | 3 - 1 - 7 | 11 | 18 | -7 | 10 |
| 9 | B71 | 11 | 2 - 1 - 8 | 10 | 27 | -17 | 7 |
| 10 | FS Vágar | 11 | 2 - 0 - 9 | 10 | 51 | -41 | 6 |

FS Vágar-B71:

# Fulmannað botnlið

**Stóra slagið í botninum verður í Miðvági leygardagin, tá sandoyingar koma á vitjan**

UPPTAKT
*Jákup Mørk*

Tað eru tvey lið í ringum skørum, sum fara á vøllin í Miðvági leygardagin. B71 og FS Vágar tykjast vera liðini, sum sínámillum skulu gera av, hvør parturin skal beina leið niður í aðru deild, í so máta verður dysturin leygardagin nærum altavgerandi.

## Spenna bogan

Tað tykist eisini, sum um bæði liðini hava tikið allar kanónirnar fram til hetta stríðið, so eftir øllum at døma verður talan um ein spennandi dyst.

Vágamenn hava seinastu vikurnar havt Jógvan Hendrik Haraldsen og Per Joensen við á liðnum, og væntandi verða teir báðir millum teir fyrstu ellivu leygardagin.

Hjá sandoyingum stóð einki til fyri viku síðani. Fleiri leikarar vóru burturfrá, tá teir taptu móti B36, men nú eru flestu teirra við aftur. Julian Florescu og Kári Nielsen eru báðir um at koma fyri seg, og harafturat kann roknast við, at Hans Jørgen Djurhuss, Jógvan Jón Petersen og Petter Ritter allir vera tøkir aftur, eftir at teir ikki vóru seinasta sunnudag.

Fyri báðar partar tykist talan vera um ein lagnudyst, har eitt tap kann fáa katastrofalar avleiðingar, meðan ein sigur hinvegin kann lyfta liðið nakað frá botnsessinum.


# Leitar tú eftir avbjóðingum ?

## Søkt verður eftir deildarleiðara til deildir okkara á Norðskála og Eiði

**Deildirnar hava sum høvuðsendamál at taka sær av dagliga kundaviðskiftinum á økinum.**

**Uppgávurnar hjá leiðaranum eru:**
- hava dagligu leiðsluna og skipa arbeiði á deildini
- skapa eitt mennandi og avbjóðandi arbeiðspláss
- tryggja at ráðgevingin og tænastan eru á høgum støði
- útinnan av kredittmetingum
- uppfylging av deildarroknskapi og fíggjarætlan
- umframt aðrar uppgávur álagdar av stjórnini

**Førleikakrøv:**
- Peningastovnsútbúgving við "Finansiel Videreuddannelse" ella HA, HD, Bachelor ella aðra viðkomandi útbúgving
- góðan kunnleika til EDV
- duga at málbera seg í skrivt og talu

Umsøkjarar, ið hava peningastovnsroyndir og/ella leiðararoyndir hava fyrimun.

**Persónligir eginleikar:**
- duga at arbeiða sjálvstøðugt og tora at taka avgerðir
- hava góð evni at umstilla seg í einum broytiligum umhvørvi
- hava góð samstarvsevni og evni at leiða ein bólk í einum kravmiklum umhvørvi

Umsøkjarin skal vera sinnaður at menna seg fakliga og persónliga.

Fleiri upplýsingar fáast við at venda sær til Steinbjørn Hardlei, starvsfólkaleiðara, ella Bjarna Olsen, stjóra, tel. 348000.

Løn og eftirløn verða ásett eftir nærri avtalu.

Umsókn, saman við viðkomandi skjølum, skal verða Føroya Sparikassa í hendi í seinasta lagi 20. august 2001, og sendast til:

Føroya Sparikassi
att.: Starvsfólkaleiðarin
Postsmoga 34
110 Tórshavn

FØROYA SPARIKASSI
Starvsfólkadeildin, Yviri við Strond 2, FO-100 Tórshavn
E-post: Starvsfólkadeildin@sparikassin.fo www.sparikassin.fo

Føroya Sparikassi hevur 21 deildir kring landið, ið serliga fáast við at veita ráðgeving, fígging og selja tænastur Sparikassans.



# Marknaðarfólk

## Søkt verður eftir starvsfólki til marknaðardeild okkara

Talan er um eitt spennandi og sjálvstøðugt starv við góðum møguleikum fyri persónligari menning.

**Uppgávurnar umfata at:**
- gera marknaðarkanningar
- tilrættisleggja og samskipa marknaðarátøk
- røkja dagliga samstarvið við deildir okkara kring landið
- gera upplegg til lýsingarstovur
- røkja dagliga samstarvið við lýsingarstovur og miðlar
- luttaka í arbeiðnum við heimasíðu okkara og øðrum marknaðaruppgávum

**Viðkomandi, ið sett/ur verður, skal:**
- hava hóskandi útbúgving innan marknaðarføring ella aðra viðkomandi útbúgving
- hava hollan teldukunnleika
- duga at skriva lýsingartekstir á føroyskum og enskum
- skyn fyri uppseting, skapi og prenti
- starvsroyndir í peningastovni ella innan marknaðarføring

**Persónligir eginleikar:**
- hevur hugflog, áræði og dugir at arbeiða sjálvstøðugt
- er fyrikomandi og hevur góð samstarvsevni

Starvsstaðið er í Tórshavn. Fleiri upplýsingar fáast við at venda sær til Ólav Jensen, marknaðarleiðara á tlf. 348 540.

Løn sambært avtalu.

Umsóknir skulu verða Føroya Sparikassa í hendi í seinasta lagi 23. august 2001, og skulu sendast til:

Føroya Sparikassi
att.: Starvsfólkaleiðarin
Postsmoga 34
110 Tórshavn

team85

FØROYA SPARIKASSI
Marknaðardeildin, Yviri við Strond 2, FO-100 Tórshavn
Tel 348 000 Fax 348 454 E-postur: Marknaðardeildin@sparikassin.fo www.sparikassin.fo

*Arbeiðsøki hjá marknaðardeildini fevnir m.a. um marknaðarføring, tænastumenning, samskipan av økismarknaðarføring, røkt og menning av heimasíðuni og innkeyp/goymsla. Í løtuni arbeiða 3 fólk á marknaðardeildini.*



VEGG SAGING
Hurðar, vindeygu, veggir, garðar o.a.

HOL SAGING
Frá Ø 24 mm. til Ø 450 mm.

GÓLV FRESING

GÓLV SLÍPING

GÓLV SAGING
Rennir, keiøki, asfalt, upptøka og burturbeining o.a.

Sosialurin - 311820

Nýggj tænasta til allar havnir í Føroyum.
Nú bora vit eisini hol í allar støddir av dekkum til fríhold.

FØROYA BETONG SAGING v/Hjaltur Tausen
Gerðisvegur • 620 Runavík • Tel. 447543 • Fax 448898


www.sosialurin.fo


# Haldórsvíkar Skúli

Søkt verður eftir lærara til tíðaravmarkað starv við Haldórsvíkar skúla fyri skúlaárið 2001/2002.

Starvið er 9 tímar um vikuna. Tann, ið settur verður, má kunna undirvísa í heimkunnleika og handarbeiði.

Umsóknirnar skulu vera skúlastýrinum í hendi í seinasta lagi leygardagin 18. august 2001.

**Haldórsvíkar Skúlastýri**
v/ Martin Hansen
438 Langasandi



# Sethús í Fuglafirði til sølu

Sethúsaognin matr. nr. 143w á Bøvegi 5 í Fuglafirði verður hervið lýst til sølu, um hóskandi boð verður givið.

Sethúsini eru umleið 400 fermetrar til víddar í trimum hæddum, kjallara-, mið- og loftshædd. Grundøkið er 600 fermetrar til víddar.

Áhugað verða biðin um at seta seg í samband við Jákup Frants Larsen á telefon 444102 ella 211102.

*Fuglafjørður, tann 09. august 2001*

**P/F Petur Larsen**
530 Fuglafjørður